

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 02 - 2013

# Norðurlond ganga á odda fyri at verja umhvørvið

Umhvørvisráðharrarnir í Norðurlondum vilja ganga á odda, tá tað ræður um at arbeiða fyri at raðfesta umhvørvið hægri í arbeiðinum hjá ST at røkka málinum um burðardygd. Hetta samtyktu teir á einum fundi í Svøríki nú um dagarnar. Hetta er eisini í tráð við avgerðina hjá altjóða samfelagnum um størri burðardygd, sum er eitt av teimum mest týdningarmiklu úrslitunum frá Rio+20, ráðstevnuni, ið ST helt um burðardygd í 2012. Heimasíðan www.norden.org/da skrivar m.a. soleiðis um fundin - De nordiske miljøministre fremhævede at økosystemerne har en afgørende betydning for samfundsøkonomien og for individets udviklingsmuligheder. Når målene for den globale udviklingsdagsorden efter 2015 fastsættes, skal jordens økologiske grænser respekteres. I de internationale miljøkonventioner, for eksempel i klimakonventionen og i konventionen om biologisk mangfoldighed, er der allerede fastsat mål som skal fungere sammen med og styrke de nye bæredygtighedsmål. Det er afgørende for en langsigtet bæredygtig udvikling at vi styrker miljødagsordenen så vi holder os inden for planetens økologiske grænser, og dette bør afspejles i de globale målsætninger. De nordiske lande har vigtige erfaringer at dele ud af, understregede Lena Ek som var ordstyrer ved miljøministrenes møde. Ministrene besluttede også at styrke arbejdet med grønne velfærdsmål i samråd med de ansvarlige inden for finans- og erhvervssektorerne samt de statistiske myndigheder som et supplement til landenes BNP. De nye velfærdsmål bør udvikles tværsektorielt og tage hensyn til udviklingen af økosystemerne. Miljøministrene besluttede desuden at gennemføre en dialog om klimaspørgsmål i forbindelse med at FN's klimapanel (IPCC) præsenterer sin rapport om klimaforandringer i september 2013 i Stockholm. Repræsentanter for erhvervslivet skal inviteres til dette møde. Initiativet til

at samle politik og erhvervsliv i dette spørgsmål er meget velkomment, siger Halldór Ásgrímsson, generalsekretær for Nordisk Ministerråd, som også deltog i mødet. For at nå Nordens ambitiøse mål er det nødvendigt at mange kræfter samarbejder. Endelig diskuterede ministrene EU's 7. miljøhandlingsprogram som skal forhandles i løbet af foråret. Ministrene fremhævede at programmet skal være tydeligt i forhold til et giftfrit miljø og indeholde en strategi til håndtering af miljø- og sundhedsrisici i form af kombinationseffekter af kemikalier, nanomateriale og hormonforstyrrende stoffer samt sundhedsskadelige stoffer i varer. Ministrene understregede også at et klimamål for EU i 2030 bør indgå i programmet. Føroyar luttóku Føroyar luttóku eisini á fundunum í Svøríki, har umhvørvisráðharrarnir samdust um tilmæli til Arktiska ráðið. Ta var Annika Olsen, norðurlendskur samstarvsráðharri, sum luttók vegna Føroyar. Í tilmælinum frá arktisku ráðharrunum, sum alment verður handað Arktiska ráðnum í mai. verður víst á, at áhaldandi tørvur er á at minka um útlátið av veðurlagsgassum fyri at verja umhvørvið, lívfrøðiliga margfeldið og okkara vistskipanir. Til tess er neyðugt at seta fleiri átøk í verk, bæði nationalt og globalt. Semja var eisini um, at arbeiðast skal miðvíst fyri at fáa eina altjóða bindandi avtalu undir veðurlagssáttmálanum í 2015. Annika framløgu um havsúrgan Í sambandi við toppfundin helt Annika Olsen framløgu um, hvussu veðurlagsbroytingarnar hava og koma at ávirka umhvørvið kring Føroyar. Í framløguni nam Annika við spurningin um at kanna og kenna avleiðingarnar av, at $CO_2$-úlátið økir súrleikan í sjónum. Í tilmælinum til Arktiska ráðið vísa umhvørvisráðharrarnir eisini á, at einasti effektivi mátin at fyribyrgja, at heimshøvini gerast súr, er at minka um útlátið. Havsúrgan er ein stór hóttan móti lívfrøðiliga margfeldinum í sjónum og serliga í teimum køldu høvunum, tí havsúrgan avlagar kálkgerðina í verum í sjónum. Í viðmerking sigur Annika Olsen -  - Tað hevur týdning, at føroyingar eru umboðaðir á toppfundum sum hesum, tí vit hava eina ábyrgd at fáa varpað ljós á tær broytingar, sum fara fram í umhvørvinum rundan um okkum. Samstundis kunnu vit geva okkara íkast til tað stóra granskingararbeiði, sum verður gjørt undir Arktiska ráðnum, og harvið stuðla arbeiðinum við at verja okkara øki og norðurhøv í heila tikið. Í Føroyum hava vit góð og roynd vísindafólk, sum granska og framleiða vitan, sum vit hava brúk fyri, tá politiskar avgerðir skulu takast. Bæði í Føroyum og tá ið vit skulu taka støðu til politiskar avgerðir, sum verða tiknar á altjóða pallinum. Myndir Norðurlendsku ráðharrarnir á fundinum í Svøríki Á myndini heldur Annika Olsen framløgu. Myndin er tikin í eini málmminu 540 metrar undir jørð Keldur -  www.norden.org.dk og www.imr.fo